# TWR – KVINNUR VIÐ VÓN

## *BØNARÁHEITANIR FYRI AUGUST 2024*

### Eystur- og Suður Afrika

1. Hjá teimum, ið hava verið offur fyri menniskjahandli, er mangan torført at hava álit á teimum í nærsambondum. Harri, gev hjálparum mildleika, tol og kærleika í arbeiðnum at vinna tryggleika og álit hjá offrunum. (Sálmur 56:4 – ensk: 56:3)
2. Himmalski Faðir, vit biðja, at Tú vilt vera hjá gentunum á Sansibar, ið verða tvingaðar at venda við til islamsku trúnna fyri at fáa arbeiði. Hjálp teimum at standa stinnar í sínari kristnu trúgv. (Kolossebr. 1:23)
3. Fátækdømi er vanligt í Burundi, nú prísirnir hækka. Nógvar familjur hava enntá ikki ráð til eina máltíð um dagin, og eru tí noyddar at bidda um mat á gøtunum. Harri, síggj til teirra og verð Tú teirra forsyrgjari. (Sálmur 23:1)
4. Meðan turkur er í Simbabve, Gud, hjálp lokalum myndugleikum og samfeløgum at fáa reint vatn til sjúkrahús, skúlar, ellisheim og fongsil. (2. Mósebók 17:6)
5. Faðir, útvega gentunum í býunum í Eswatini, ið hava skøkjulevnað til livibreyð, onnur og betri størv. Leið tær til eitt betri lív við Tær sum vegleiðara. (Sálmur 18:7 – ensk: 18:6)
6. Harri, lat álit og friðarligt samskifti verða bygt upp millum tey, sum trúgva á Jesus **í** Somalia, og tey**,** sum ikki trúgva, so at sleppast kann undan ósemjum og stríði. (Hebrearabrævið 12:14)
7. Harri, lat kynsligan harðskap fáa ein enda í Suðurafrika. Lat kirkjur og samkomur vera framtakshugaðar at veita praktiska frálæru og vegleiðing, so at hjørtu verða umbroytt. (Sálmur 121:7-8)
8. Takk, Faðir, at kvinnur koma til trúgv á Jesus Kristus og vaksa í samfelagnum við Gud gjøgnum TWR *Kvinnur við Vón* trúartænastuna í Etiopia. (Rómbr. 10:17)
9. Harri, blás lív í og endurnýggja hjúnaløg í Botswana, har talið á hjúnaskilnaði eru sera høgt. Grøð tey, ið líða orsakað av hjúnaskilnaði. (Sálmur 30:3 – ensk: 30:2)
10. Gud, útvega seymimaskinur til kvinnur í Tansania, ið eru flóttafólk, so tær kunnu læra og fáa førleika til íverksetan. (Orðtøkini 22:29)
11. Sjálvt í fátæksligu økjunum í Burundi nýta menninir lítlu inntøku sína í ótrúskapi til skaða fyri familjuna. Broyt hjørtuni á hesum monnum, Harri! (Hebrearabr. 13:4)
12. Harri, reis upp gudsóttandi leiðarar í Simbabve, ið vilja skýggja mutur og trúfastir arbeiða fyri betri sosialum og búskaparligum úrtøkum og andaligum ávøkstri. (2.Mósebók 18:21)
13. Gud, vit biðja, at mentanin í Eswatini, ið forðar kvinnum at hava leiðandi størv í kirkjum og samkomum, skal verða broytt. (Orðtøkini 4:7)
14. Faðir, veit fólkinum í Somalia trygd og verju. Varða fólkið frá vápnaðum bardøgum rundan um tey og veit hesi tjóðini frið. (Sálmur 91:1-2)
15. Harri, vit prísa Tær fyri tey mongu, ið arbeiða sjálvboðin hjá TWR *Kvinnur við Vón* í Suðurafrika. Serstakliga fyri tey, sum umseta bønarkalendaran. Veit Tú teimum millum teirra egnu ein samskipara, sum stórur tørvur er á. (Filippibr. 1:3)

16. Gud, vegleið og hjálp teimum, sum hava fingið prógv frá lærdum háskúlum í Etiopia, og ikki kunnu finna starv. Veit teimum vísdóm og verju, ið fara av landinum at finna sær arbeiði. (Orðtøkini 16:3)
17. Harri, vit biðja Teg um at verja gentur í Botsvana frá at gerast bundnar av rúsdrekka og øðrum rúsevnum. Set hesi børn í frælsi, og hjálp familjunum at ala tey upp. (Matteus 6:13)
18. Harri, lat fleiri útvarpsstøðir í Tansania varpa út *Kvinnur við Vón* sendingar, so at fleiri kvinnur kunnu finna vón og grøðing í Jesusi. (Rómbr. 15:13)
19. Faðir, vit biðja, at valið til nýggja stjórn í Burundi í 2025 má ganga friðarliga fyri seg, tí ófriður ávirkar kvinnur og børn í størri mun. (Dániel 2:21)
20. Gud, í Simbabve, har nógv fátækdømi og arbeiðsloysi valdar, lat familjuforsyrgjarar, halda seg frá rituellum ósiðum, skøkjulevnaði og sølu av ólógligum evnum fyri at forvinna til lívsins uppihald. (Sálmur 54:6 – ensk:54:4)
21. Harri, broyt mentanina í Somalia, so siðvenjan at umskera gentur kann fáa ein enda. Nógvar kvinnur líða av hesum. (Sálmur 5:12 – ensk: 5:11)
22. Faðir, send nógv regn til tey økini í Suðurafrika, har turkur er, so tað kann lætta um fátækradømið og óvissuna hjá kvinnunum at fáa mat til vegar. (Zakarias 10:1)
23. Vit prísa tær, Harri, at Tú hevur veitt grøïng og forsyrgt familjum, sum eru fyribiðjarar hjá TWR *Kvinnur við Vón* í Etiopia.. (Sálmur 103:1-5)
24. Faðir, vit biðja, at Tú varðveitir og troysta**r** kvinnurnar í Tansania, sum uppliva at verða kynsliga misnýttar fyri at fáa arbeiði. (Sálmur 91:14)
25. Gud, vit biðja, at kvinnur í Burundi kunnu fáa upplæring í íverksetan, so tær kunnu fara undir eina lítla fyritøku. (Orðtøkini 3:13)
26. Faðir, uppihalt sakleysu fólkunum í krígsraktu økjunum í Etiopia, ið líða undir at hava ov lítið til matna. (Sálmur 40:17)
27. Hóast trúarfrælsi er í Somalia, eru nógvar forðingar hjá teimum kristnu at bera boðskapin um trúgv á Jesus. Harri, lat frelsuboðskapin hava framgongd. (Ápostlasøgan 4:29-31)
28. Gud, vit biðja fyri kvinnum í Suðurafrika, ið eru mótleysar um lívið og líða av tunglyndi. Lat tær seta vón sína á Jesus. (Sálmur 34:18-18-19 – ensk: 34:17)
29. Gud, reis upp sjálvboðin og eggja til nýggjar bønarbólkar hjá TWR *Kvinnur við Vón* trúartænastuni á oyggjunum Pemba og Sansibar og á meginlandinum í Tansania. (Matteus 9:37-38)
30. Faðir, verj giftar kvinnur, ið verða illa viðfarnar í samfeløgunum í Burundi. Tá ið klandur er í hjúnalagnum, fær kvinnan altíð skuldina, hóast maðurin hevur íbirt tað**.** (Sálmur 43:1)
31. Harri, fría unga fólkið í Simbabve frá rúsevnismisnýtslu, stuldri, siðloysi og samleikakreppu. Lat tey koma at kenna Teg og verða sett í frælsi. (Kolossebr. 1:13)

***KVINNUR VIÐ VÓN***

**twrwomenofhope.org**

# At halda fast við vónina

**Eftir Susie Pek, altjóða leiðara hjá TWR Kvinnur við Vón**

“Hví grætur tú, mamma?” spurdi lítla Manu, meðan hon hugdi at, tá mamman fevndi vinkonu sína. “At siga farvæl er nógv torførari, enn eg helt,” svaraði mamman. Vinkona mín og eg hava fingið so nógv góð minnir saman gjøgnum árini, tað er ringt hjá mær at lata hana fara.”

Hin lítla tóktist júst at vita, hvussu hon kundi ugga tær – hon læt skuffuna upp framman fyri sær og gjørdi kvinnurnar ovfarnar við at geva vinkonuni eina stuttliga mynd av mammu síni. Skjótt vóru tárini broytt til látur. Smágentan við slíkum eymum hjarta legði aftrat: “Nú fert tú altíð at minnast hana!”

Tað kann vera hjartaskerandi at siga farvæl. Tað ber eisini við sær óvissu og spurningar. “Fara vit nakrantíð at síggjast aftur? Hvussu fara dagarnir at verða, tá ið tann persónurin ikki er saman við okkum longur?” Kanska tora vit at seta slíkar spurningar hart, meðan vit royna at fjala okkara djúpasta ótta: Fari eg at verða gloymd?

Lítla Manu hevði brúk fyri einum svari til órógvandi spurningin í hjarta sínum. “Tanta, tú fert ikki at gloyma mammu mína, tí nú hevur tú eina mynd av henni, men fert tú at gloyma meg?” Tanta smíltist og segði: “Hvussu kundi eg gloymt teg? Eg kendi teg, áðrenn tú vart fødd!” Eyguni á Manu lýstu upp og søgdu frá, gleðini hjá einari genu, sum visti, at hon var elskað!

Hetta elskuliga, sakleysa barnið tordi at seta ein avgerandi spurning: “Eri eg nóg týdningarmikil til, at onkur minnist meg?” Spurningur hennara leiðir meg til Sálm 13: 2-3 (ensk: 13:1-2), ið gevur okkum innlit í, hvussu sálmaskaldið hevur havt tað: “Hvussu leingi, Harri? Fert Tú at gloyma meg í allar ævir? Hvussu leingi fert Tú at fjala andlitið fyri mær? Hvussu leingi skal eg hýsa stúran í sálini, angist í hjartanum dag eftir dag?”

Sálmaskaldið kendi seg gloymdan, men sum hann oysir út hjarta sítt fyri Harranum, fær hann mót. Hann grundar á æviga kærleika Hansara: “Men eg líti á náði Tína; hjarta mítt skal gleða seg í frelsu Tíni, eg skal lovsyngja Harranum fyri, at Hann var mær góður!”(Sálmur 13: 6 – ensk: 5)

Eg eri júst komin aftur úr Afrika, har eg hevði ein frálíkan møguleika at vitja okkara lurtarar í Xhosa ættarbólkinum í eini fjarskotnari bygd. Ein maður í bygdini var eins djarvur og lítla Manu og segði øllum frá, hvussu ovfarin hann var, at vit vóru komin at vitja hesa “gloymdu” bygd. Eygu hansara lýstu upp, við at hugsa, at tað vóru fólk langt burtur, ið vóru góð við tey. Hesir menn og hesar kvinnur fingu mót og styrki við at vita, at Gud sær tey.

Eg eri signað við tí forrætti at kunna bera henda boðskap, at tey eru sædd, elskað av alheimsins Skapara, sum hevur umsorgan fyri teimum – ikki einans við serstøk høvi, men hvønn einasta dag. Eg smílist, tá ið eg hugsi um, at hetta er eisini satt fyri okkum.

“Mann kvinna gloyma bróstabarn sítt, so hon miskunnar ikki lívsfrukt síni! Og um so var, at tær kundu gloymt, gloymi Eg ikki teg! Hygg, í báðar hendur Mínar havi Eg rist teg, múrar tínir eru Mær altíð fyri eyga!” (Esaias 49: 15-16)

*KVINNUR VIÐ VÓN* **(twrwomenofhope.org)**

## Undirvísa, lívga, útgera kvinnur til at læra, biðja, lurta, vaksa og geva

**Fíggjarstuðul:**

**EvR (Evangeliska Røddin) hevur konto í Betri Banka nr. 9181 000 533 7145**

**til at flyta pening tilskilað til TWR (Trans World Radio).**

**Allur stuðul, sum kemur inn á hesa konto fer óskerdur til arbeiðið hjá TWR.**

**TWR PO Box 12, 82002 Bratislava 22 – Slovakia — twre@twr.org**